ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 24. november 2009

# Stór badminton-kapping í Klaksvík

**5. desember verður stór badmintonkapping í Klaksvík. Kappingin verður skipað sum ein opin kapping, har øll eru vælkomin at taka lut**


jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Talan er um mest sum søguligan badminton-dag í Klaksvík. Hetta er nevnliga fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð, verður stór badmintonkapping í Klaksvík.

Kappingin verður skipað sum bólkaspæl í innleiðandi umfari. Eftir bólkaspælið verður leikt eftir cup-leisti. Altso at tað bert er vinnarin av hvørjum dysti, sum tá fer víðari.

Kappingin ber heitið, Kjølbro Open, og kann teknast til hesa við at senda teldupost til mail@2improve.fo. Í teldupostinum skal skrivast navn og føðingar-dagur. Seinasta freist at tekna seg er týsdagin 1. desember.




Tað verður sjálvandi í nýggju Badminton-høllini, at kappast verður, tá Kjølbro-Open í badminton fer av bakkastokki annað vikuskiftið



Inniróðurin er í ár skipaður sum kapping, ið fevnir yvir alla vetrarhálvuna

# Rógva við fullari megi

**Sunnudagin skipaði Róðrarfelagið Knørrur fyri næsta umfarinum av vetrarkappingini í inniróðri**

Felagið hevur vetrarvenjingar sínar í hølunum á Saltsøluni við vestaru Bryggju, og tað var eisini har, at kappast varð.

Hjá teimum yngstu vunnu Anna Louisa Nielsen og Møkir Sjúrðarson í Jákupsstovu. Hjá U18 vunnu Gunnvá Fossaberg Ellingsgaard og Brestir Mikkelsen, og kappingina fyri tey vaksnu vunnu Johanna Petersen og Sverri Tórstún.

Næsta umfar av kappingini verður 13. desember. Til ber at síggja fleiri úrslit, støður og myndir á heimasíðuni hjá Róðrarfelagnum Knørri, www.rk.fo.

-mørk

**RK-prix, samlaða støðan**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| **U15, gentur** | | |
| 1 | Anna Louisa Rubek Nielsen | 600 |
| 2 | Lilja Luid | 540 |
| 3 | Herdis Petursdóttir í Gong | 460 |
| 3 | Kristina Gunnarstein | 460 |
| **U15, dreingir** | | |
| 1 | Mækir Sjúrðarson í Jákupsstovu | 530 |
| 2 | Pætur Jákupsson | 460 |
| 3 | Janus Hannesarson | 400 |
| **U18, gentur** | | |
| 1 | Gunnvá F. Ellingsgaard | 600 |
| 2 | Lív Gullbein | 540 |
| 3 | Tordis L. Magnussen | 250 |
| **U 18, dreingir** | | |
| 1 | Brestir Mikkelsen | 570 |
| 2 | Arnbjørn Isfeld | 520 |
| 3 | Hallur Nattestad | 300 |
| **Kvinnur** | | |
| 1 | Johanna Petersen | 600 |
| 2 | Eik Gullbein | 540 |
| **Menn** | | |
| 1 | Remi Lamhauge | 520 |
| 2 | Petur í Gong | 480 |
| 3 | Rúni Joensen | 440 |